# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Vælferð og ábyrgd

Samfeløg, sum eru skipað við marknaðarbúskapi, hava allar dagar verið eyðkend av meira ella minni ógvusligum búskaparligum sveiggjum. Síðan kapitalisman gjørdist ráðandi samfelagsskipan, hevur heimurin verið raktur av størri og minni kreppum. Orsøkirnar til hesar kreppur hava verið ymiskar: ovurframleiðsla, skiftandi efirspurningur, kríggj ella krígsótti, ótamd lántøka ella ov vánaligir lánsmøguleikar fyri bert at nevna nakrar av teimum mongu kreppuorsøkunum, sum heimurin hevur upplivað, síðan ídnaðarkollveltinin av álvara tók seg upp fyri gott og væl tvey hundrað árum síðani.

Myndugleikar og stjórnir í ídnaðarlondunum hava alt hetta tíðarskeið staðið ivandi og mangan púra máttleys mótvegis teimum mongu altoyðandi búskaparkreppum, sum við føstum og afturvendandi millumbilum hava herja ídnaðarlondini. Hyggjuráðini hava verið mong og virknið av teimum mong hyggjuráðunum hava verið ymisk. Ráðini hava fevnt um so at siga alt, eitt nú, frá bert at lata til standa og so til at fara inn og stýra búskapinum við harðari almennari hond. Afturat hesum hevur verið ørgrynni av meira ella minni virknum millumloysnum. Vit hava so mangan her á hesum teigi umrøtt hesi mongu og fjølbroyttu tiltøk, og lata tey tí liggja. Blað, Rás2 og Portalur hava eftir besta førimuni roynt at fáa eitt javnt orðaskifti um búskaparpolitikkin. Hvørt hetta er eydnast okkum til fulnar, mugu onnur meta um, men vit fara tó at vera so ósmæin at halda, at seinastu mongu árini eru mong áhugaverd sjónarmið komin í ljós, sum hava givið politikkarum og almenningin sum heild nakað at hugsa um.

Uttan mun til, hvørja búskaparliga skipan eitt samfelag hevur og uttan mun til, hvørt ein heldur seg til marknaðarbúskap, planbúskap ella eina hóskandi blanding av báðum skipanum, so stendur tó ein meginregla yvir øllum. Hendan meginregla snýr seg um ta ábyrgd fyri vælferð borgarans, ið einhvør stjórn hevur í einumhvørjum nútímans fólkaræðiligum landi. Vit hava síðan annan heimsbardaga í Vestureuropa bygt upp eitt sokallað vælferðarsamfelag ofta eftir norðurlendskum leisti. Hetta vælferðarsamfelag verður mangan lastað, hildið fyri gjøldur og enntá lagt beinleiðis fyri hatur, eitt nú tí at hesin samfelagsmyndil vankliga merkir eitt hart skattatrýst, og skattatrýst meta nógv javnt við ágang frá samfelagsins síðu. Kortini vil eingin missa vælferðarsamfelagið.

Hvørja ferð búskaparkreppan herjar við somu afturvendandi vissu sum beinkrím, so fáa vit tjak um bestu hyggjuráðini. Vit fáa nógv góð ráð, um hvørji tiltøk, ið løgting og landstýri eiga at sera í verk og vit fáa enn fleiri ráð um, hvørji ráð ein ikki eigur at taka til. Hetta orðaskiftið er gott fyri fólkaræðið bert vit eru samd um ta grundleggjandi meginreglu, at okkara fólkavaldu í somu løtu hesi átóka sær ábyrgdina av valinum, eisini átóku sær ábyrgdina av okkara vælferð. Hetta merkir, at allur kreppupolitikkur eigur at verða rikin við hesi ábyrgd í huga og við fyriliti fyri hesi ábyrgd. Orð løgmans her í blaðnum í gjár benda á, at sitandi samgonga kennir seg bundna av hesi ábyrgd og so fáa vit at síggja um landsstýrisflokkarnir og møguliga andstøðan við hava moralska og politiska máttin, ið skal til.

**Sosialurin**

## Fleiri pengar enn uppgávur?

**HEÐIN MORTENSEN**
borgarstjóri í Tórshavnar kommunu



Eingin noktar nøkrum eina javningarskipan, ið tryggjar øllum landsins borgarum javnbjóðis lógarbundnar veitingar, eitt nú góðan fólkaskúla. Tvørturímóti vísa vit í verki, hvussu framtíðin skal tryggjast, og at tey fáa góðar karmar, sum skulu bera fólkapensjónir og rakstur av ellis- og røktarheimum. Missa vit ungdómin, missa vit alt!

Vit í Tórshavnar kommunu eru og hava altíð verið til reiðar at taka yvir kommunalar uppgávur, sum landið røkir, men hetta skal gerast á skipaðan hátt, har ábyrgd og gjald fylgist. Soleiðis er eisini, tá vit tosa um ellis- og røktarheim í Suðurstreymoy.

At Asbjørn Djurhuus og tey í Sundalagnum ikki hava fyri neyðini at gera íløgur í vinnuna, kunnu vit frøast um, tí so mikið meira er til annað. Sjálvur er hann ein vitugur vinnulívsmaður og góður útgerðarmaður, tað eg veit um. Eisini er hann góður formaður fyri Føroyar Kommunufelag.

Men at vit sum kommunalpolitikarar ikki hava somu avbjóðingar, sæst týðiliga av hansara skriving. Asbjørn eigur at skilja, at tað kostar at skapa karmar fyri arbeiðsplássum, og kanska er tað tí soleiðis, at Asbjørn hevur pengar at javna við, tá hann sleppur so lætt við vinnuligum íløgum?

Eg eri ikki blindur fyri øllum hansara borgarum, sum dagliga koma til Havnar at vinna fyri dagligt breyð, og Asbjørn skal vita, at vit dagliga gleðast um at samstarva við øll hesi. Men samstundis er harmist eg, um hetta samstarv skal fáa eitt skot fyri bógvin.

Mørkin í Streymnesi er eitt valaverk, sum fólk har norðuri sjálvandi eru fegin um. Men tað ber bara ikki til hjá okkum, sum ikki hava pengar til hesa landsuppgávu. Spell, at Asbjørn breggjar sær av at hava loyst landið frá síni uppgávu at byggja og reka ellis- og røktaheim, tí hetta gerst bara, tá ein hevur fleiri pengar enn uppgávur.

Góði Asbjørn! Lat ongan iva vera um, at uppgávuna at byggja ellis- og røktarheim eigur landsstýrið, so leingi henda ikki er latin kommununum. At tú og tínir menn hava avlagað hesa skipan, fái eg ikki róst tær fyri, tí eftir sita vit, sum ikki røkka hesum við at taka frá øðrum kommunalum økjum.

Nú tú dregur Tórshavnar havn upp í hetta málið, kundi eg hugsað mær at spurt, hvussu stóran bíðilista tit hava til bátapláss í Sunda kommunu! Vit hava umleið 600 á bíðilista! Og hvussu nógv taka tit í árligum havnargjaldi frá eitt nú einum 27 fót báti? Hjá okkum er gjaldið smáar 5.000 krónur.

Jú, javning kann vera, men so skal tað vera við skili, tí tað kostar at reka eina kommunu. Viðhvørt ljóðar tað, sum hava summi fingið ta fatan, at tað er ókeypis at reka Tórshavnar kommunu og at hon kemur sovandi til tað heila. Einki kundi verið skeivari enn tað!

Vit í Tórshavnar kommunu gera alt fyri at finna tær 45 milliónir krónurnar, ið er okkara íløgupartur av ætlaða ellis- og røktarheiminum Yviri við Strond. Høvdu tú og tíni í sóknastýrinum latið landið røkt sínar uppgávur og vit okkara, høvdu vit kanska øll verið komin longur á eldraøkinum!

## Gevast at fiska – og hvat so?

**MORTAN JOHANNESEN**
útróðrarmaður



**Nú kom so ICES við síni tilráðing viðvíkjandi fiskiskapinum undir Føroyum og er hann tann tann sami – ongin toskur og ongin hýsa skal fiskast, og 20% niðurskurð í upsaveiðini. Hvat inniber so tað, um ráðini verða fylgd?**

Smáu trolbátarnir á landleiðini fáa tosk sum hjáveiðu, so teir mugu gevast við at fiska. Teir smáu lemmatrolararnir, sum ikki fiska á landleiðini, ment beint uttanfyri, fáa eisini tosk og hýsu, so teir mugu eisini leggjast. Partrolararnir fáa eisini á ávísum leiðum tosk og hýsu sum hjáveiði, samstundis sum teir verða niðurskornir við 20%, og saman við toskinum gevur tað ein niðurskurð, um teir bara skulu veiða upsa, upp á uml. 40%. Garnabátarnir, sum fiska havtasku, fáa til tíðir væl av toski sum hjáveiðu, so teir mugu eisini gevast. Og ikki at gloyma húkaflotan, sum bæði fiskar tosk og hýsu.

Men lat okkum nú halda okkum til tilráðingina frá ICES og leggja hesar skipabólkar, sum bæði beinleiðis og óbeinleiðis fiska tosk og hýsu, tað er onki at ivast í, at bæði fiskifrøðingar og búskaparfrøðingar meina at hetta er rætt.

**Men so kemur tann brennandi spurningurin? Hvussu verður hjá tí meiniga føroyinginum og hjá Føroya landi sum heild, tá skipini liggja og virkini eru stongd – kann ongin av teimum, sum eru fyri eini slíkari friðing av toski og hýsu, svara hesum spurningum.**

Eitt er vist, at eftir eitt langt lív á sjónum við fiskarii, bæði við Føroyar og á fjarleiðum, veit eg, at tað er ongin sjálvfylgja, um allur føroyski fiskiflotin verður lagdur í 3 til 4 ár, at fiskur tá verður aftur at fáa á Føroyagrunninum í stóran mun. Um so verður, hava vit tá nakað fólk at manna tey skip, sum eftir eru.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.